Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Hammer, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Hagtøl yvir avlýsingar hjá Smyrli og avloysaraskipum á Suðuroyarleiðini

Spurningar:

1. Hvussu nógvar avlýsingar hava verið á Suðuroyarleiðini frá 1990 til í dag?
2. Hvussu býta avlýsingarnar seg mánaðarliga og árliga fyri hvørt einstakt skip á leiðini - eisini fyri avloysaraskip?

Viðmerkingar:

Avlýsingar á Suðuroyarleiðini eru blivnar ein afturvendandi trupulleiki hjá teimum, sum búgva og virka í Suðuroynni og øllum, sum brúka farleiðina í síni heild. Spurningurin er, um hetta er nakað, sum hevur vundið upp á seg seinastu árini, ella um tað altíð hevur verið soleiðis.

Tey, sum minnast aftur í tíðina, siga seg ikki hava upplivað so nógvar avlýsingar sum nú, men gott hevði verið at fingið innlit í veruligu tølini. Er veruleikin tann, at nógv flestar avlýsingar eru í nýggjari tíð? Tað er umráðandi at fáa eitt neyvt útgreinað yvirlit yvir allar avlýsingar, sum hava verið til og frá Suðuroynni frá 1990 til í dag. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 21. januar 2022

Bjarni Hammer